# handVERKARIN

2. ÁRSFJÓRÐINGUR 2004 BLAÐ NR. 11 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# – Ein var maður, ið úti stóð …
# Handverkarar sunnan fyri Hórisgøtu

Síðani 1997 hava umleið $^{2}/_{3}$ av føroyskum handverkarum verið hildnir uttanfyri alla ávirkan og luttøku í øllum almennum ráðum og nevndum, sum hava samband við føroyskt handverk.

Tað einasta hesir útihýstu handverkar hava felags er, at teir arbeiða sunnanfyri Hórisgøtu, og eru limir í Landsfelag Handverkaranna. At hetta skal vera ein vansi, sum „absolutt" skal revsast, er ilt at skilja.

Havnar Handverkarafelag hevur saman við Landsfelag Handverkarafelag áhaldandi gjørt vart við hesi ódemokratisku viðurskifti.

Hóast talan er um eitt ótal av áheitanum, so hava vit á hvørjum ári bara kunna staðfest, at tað ikki hevur verið ómakin vert, – tað hevur verið sum at sletta vatn á gás.

Øll hesi mongu ár hava vit kortini vónað og uggað okkum við at siga, at hetta man fara at fáa ein enda – eins og alt annað órættvísi í hesum heimi.

Og tá løgtingið 20. apríl í ár samtykti lóg, sum greitt sigur, at Landsfelag Handverkaranna skal vera umboðað í Yrkisútbúgvingarráðnum, roknaðau vit við vissu við, at nú fór okkurt at henda, men nei.

Einferð enn mugu vit troystra okkum við at siga „tolin trývst", og so bara vóna, at onkuntíð man onkur fara at vakna.

**Í blaðnum hesa ferð:** **síða**


**Egon Øregaard:** Hvønn veg skulu vit fara…? 3

**Pauli Hofgaard:** Ýrkisútbúgvingarnar og tað at hava lærlingar
– sæð frá einum vinnusjónarhorni 4

**Bárður Davidsen:** Fekk „Gylta hamaran" 5

Nógv virksemi í felagnum 6

Myndir frá aðalfundinum 16-17



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 16. august 2004 · **Blaðið er prentað: 23. juli 2004**
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Telefon 31 15 48 · fax: 31 95 48 · teldupostur: hhvf@post.olivant.fo.

## *Egon Øregaard: Stjóri á Tekniska skúla í Tórshavn*

# Hvønn veg skulu vit fara…?

**Vit nýta ofta vendingina „við eitt vegamót“. Orðabókin sigur, at tað er „har vegir møtast“.**



Lítil ivi er um, at handverksútbúgvingarnar í Føroyum eru á einum vegamóti. Gamla og nýggja tíðin hava ført vegirnar saman.

Spurningurin er, hvønn veg skulu vit velja, hvør tekur avgerðirnar, hvussu skal ferðin skipast; – og hvussu stór skal ferðin verða, í hestavogni ella í einum „Ferrari“. – Á vegamótinum kunnu vit undir ongum umstøðum verða standandi.

### Lýsing í tíðindablaði

Fyri stuttum sat eg í tokinum, á veg úr Keypmannahavn til Middelfart, har aðalfundur hjá „Foreningen af skoleledere“ (FS) skuldi haldast. Í tokinum kom eg fram á eina lýsing, frá privatum hárfríðkaraskúlum í einum tíðindablaði. Hon fekk meg at steðga á og gav mær nakað at hugsa um.

Lýsingin ljóðaði nakað soleiðis:

> **Frisøruddanelsen på 1 år, og få job**
>
> 70 % af de uddannede 1-årige frisører har job efter 8 uger.
>
> Diplomfrisøruddanelsen har samme faglige indhold, og afsluttes med samme eksamen som den 4 årige lærlingeuddanelse.

Komin á aðalfundin spurdi eg meg fyri og fekk at vita, at eisini tær av vinnuni „viðurkendu“ salongirnar í Danmark tóku undir við hesu útbúgving.

### Støðan í Føroyum

Hvat hevur hetta so við okkara handverkarautbúgving í Føroyum at gera? Tá fyrsti handverkaraskúlin byrjaði í Føroyum í 1825, var tað danskur embætismaður, sum stóð fyri hesum.

Øll tey seinastu mongu árini, hevur tann danska handverkaraútbúgvingin verið fyrimyndin fyri handverkaraútbúgvingunum í Føroyum.

Líka fram til miðskeiðis í 1990unum, hava donsku kunngerðirnar, fyri tær ymsu útbúgvingarnar, verið góðkendar at galda hjá okkum.

Tvey tey seinastu árini tykist vend at verða komin í, og kemst hetta partvís av, at vinnan í Føroyum ynskir, at handverksútbúgvingarnar skulu lagast meiri til føroysk viðurskifti.

Onnur grundin er óivað, at broytingarnar innan útbúgvingarnar í Danmark, eru so stórar, at vit á fleiri økjum

*… framhald á síðu 12*

*Pauli Hofgaard, stjóri, L.M.-Electric:*

# Yrkisútbúgvingarnar og tað at hava lærlingar – sæð frá einum vinnusjónarhorni

**Pauli Hofgaard er útbúgvin elektrikari og sterkstreymsverkfrøðingur. Hann lærdi til elektrikara hjá Leif Mohr árini 1982-1986. Í 1987 flutti Pauli til Keypmannahavnar har hann fór at lesa verkfrøði. Og í 2000 tók Pauli prógv sum sterkstreymsverkfrøðingur, og varð tá settur sum stjóri hjá L.M.-Electric.**



Yrkisdepilin skipaði í mars mánaði í ár fyri árligum Yrkisfundi, sum var hildin við luttøku av ráðslimunum, øllum yrkisnevndarlimunum og øðrum innbodnum.

Á fundinum røddi Pauli Hofgaard, stjóri hjá L.M.-Electric um evnið: „Yrkisútbúgvingarnar og tað at hava lærlingar í læru – sæð frá einum vinnusjónarhorni". Sjónarmið hansara eru áhugaverd, og eftir áheitan hava vit fingið loyvið frá Paula Hofgaard at hava røðuna við í Handverkaranum.

## Vinnusjónarhornið

Fyrst vil eg takka fyri tað álit, sum er víst mær, nú heitt er á meg um at siga nøkur orð og hugleiða um „Yrkisútbúgvingarnar og tað at hava lærlingar í læru – sæð frá einum vinnusjónarhornið".

Sum nevnt, eiti eg Pauli Hofgaard og útgangsstøðið hjá mær at siga nakað um hetta evnið, er mítt dagliga arbeiði.

Eg eri stjóri í einari av størstu fyritøkunum innan el-handverkið í landinum, LM-Electric, og hava vit haft á leið 10 lærlingar í meðal um árið.

Eg kann sjálvandi í hesum høpi bert tosa út frá teimum royndum, sum eg havi frá mínum egna dagligdegi, og ikki fyri allar meistarar í Føroyum.

Eg fari ikki at siga so nógv um ymisku Yrkisútbúgvingarnar, tí tað havi eg ikki førleika til, men fari heldur at brúka krútið uppá handverksútbúgvingina og lærlingarnar.

*… framhald á síðu 20*

*Bárður Davidsen, nýútbúgvin húsasmiðjur:*

# Bárður Davidsen fekk Gylta hamaran



Bárður Davidsen er 32 ára gamal, føddur 21. februar 1972. Hann er uppvaksin í Hósvík.

Bárður er sonur Ova Davidsen, sum lærdi til møbilsnikkara hjá Bjarka Jacobsen í Havn. Seinni stovnaði Ovi egið virkið í Hósvík, har hann m.a. gjørdi køkar. Mamma Bárð, Jytte Davidsen, er ættað úr Øravík.

**Í møbilsnikkaralæru**

Í 1989 fór Bárður at læra til møbilsnikkara hjá Bjarka Jacobsen í Havn. Bjarki Jacobsen gjørdi tá m.a. teir væl kendu „Liljukøkarnar". Men tá virkið hjá Bjarka gavst í 1991, og Bárður ikki fekk annað lærupláss var ikki møguligt hjá honum at halda fram við møbilsnikkaralæruni.

Bárður hevði eftir hetta ymisk fyrifallandi arbeiði, var m.a. til skips eitt tíðarskeið. Og árini 1993-1999 arbeiddi hann hjá Fiskavirking í Havn.

**Arbeiddi uttanlands**

Í 1999 fór Bárður til Noregs at arbeiða, hjá føroyskum byggimeistara. Har kom hann at arbeiða saman við einum vinmanni, Finn Christensen, sum seinni gjørdist lærumeistari hansara.

Bárður arbeiddi eitt tíðarskeið eisini í Danmark, – einar 6 mánaðir. Í apríl 2000 flutti hann aftur til Føroya.

**Arbor hjá Finn Christensen**

Og tá Finn Christensen, sum hann hevði arbeitt saman við í Noregi, stutt eftir hetta setti á stovn egið virkið, „Arbor", fekk Bárður arbeiði hjá honum.

Har dámdi honum so mikið væl, at hann 15. mai 2001 valdi at fara í læru sum húsasmiður hjá Finn Christensen. Av tí, at hann frammanundan hevði verið í møbilsnikkaralæru fekk hann lærutíðina stytta við einum hálvum ári.

**Sama pensum umaftur**

Tá Bárður var í møbilsnikkaralæru hevði hann gingið 20 vikur á Tekniska Skúla í Havn. Hóast hetta so mátti hann nú taka sama skúlaskeiðið við sama pensum umaftur. Hetta gjørdi, at hann sjálvandi var sera væl fyri á hesum fyrsta skeiðnum, men tað var kortini mangan møtimikið, leggur Bárður, við einum smíli, afturat.

*… framhald á síðu 30*

*Ársfrágreiðing:*

# Nógv virksemi í felagnum

**Seinasta árið hevur verið merkt av nógvum og drúgvum fundarvirksemi í felagsnevndini, í Eftirlønargrunninum, í Landsfelagnum og nógvir fundir hava eisini verið í sambandi við lønarsamráðingarnar.**

**Lønarsamráðingar**
Teir fyrstu samráðingarfundirnir við Meistarafelagið førdu ikki til nakað úrslit, og tá tað stóð í botni vóru boð send eftir semingsmonnunum. Meistararnir bjóðaðu okkum tá 1,08 kr. brutto um árið í tvey ár.

Eftir semingsroynd í útivið 30 tímar, blivu vit samdir um at góðtaka uppskotið, sum tá fyrilá. Úrslitið var, at vit fingu eina lønarhækkan uppá 2,77 kr. fyrsta árið, og 2,72 kr. seinna árið. Eftirlønin hækkaði eisini við 2% í 2003, og 1,5% í oktober í ár, og vit fingu 0,5% uppá halgidagsgrunnin. Samanlagt var talan um eina lønarhækkan uppá 9,43%.



**Fíggjarmálaráðið**
Vit hava eisini verið til lønarsamráðingar við Fíggjarmálaráðið um nýggjan fastlønarsáttmála.

Eftir trý samráðingarumfør komu vit undir land, og undirskrivaðu nýggjan 2-ára sáttmála, sum lá um 9%. Samstundis var arbeiðsvikan stytt úr 42 tímum til 39,5 tímar um vikuna, so samanlagt var talan um eina lønarhækkan, sum liggur um 10%.

**Húsakeyp í Sjúrðargøtu**
Í fjør keypti felagið húsini í Sjúrðargøtu 20 frá Meistarafelagnum, og meta vit at hetta var eitt gott keyp. Tó so, – kjallarin fuktaði nakað illa, so vit verða noyddir at brúka nakað av peningi til at seta kjallaran í stand fyri. Men tað vóru vit greiðir yvir, tá ið vit keyptu húsini.

Vit eru byrjaðir at seta kjallaran í stand og hava brúkt einar 200.000 kr. higartil til endamálið, og koma at brúka nakað av peningi afturat. Men tá kjallarin er liðugur hava vit fingið eitt gott høli, og sjálvandi økt munandi um virðið av húsinum.

Húsakeypið hevur eisini ført við sær, at tað koma nógv fleiri limir á gátt hjá felagnum, og tað hevur stóran týdning.

## Partabrøvini

Partabrøvini, sum vóru keypt í Atlants Kolvetni, hava ikki enn givið nakað avkast, og ilt er at siga nær tað verður, - ella um tað verður. Vit tosa annars javnan við peningastovnarnar um áhugan fyri partabrøvunum.

## Húsini í Stoffalág

Ogn felagsins í Stoffalág er framvegis útleigað til Tórshavnar Býrað. Vit hava gjørt sáttmála við Býráðið, sum er galdandi til 1. august 2005.

## Blaðið Handverkarin

Tað eru nú komnar 11 útgávur av Handverkaranum, og blaðið tikist framvegis at vera væl móttikið. Men sum sagt áður, so er ynskiligt, at limirnir eisini lata blaðnum tilfar. Tað kundi t.d. verið lesarabrøv, ella annað viðkomandi tilfar.

## Aðalfundirnir 17. mars 2004

Bæði felagið og Eftirlønargrunnurin høvdu regluligan ársaðalfund mikudagin 17. mars 2004 á Hotel Hafnia.

Á skránni var m.a. val av nevndarlimum.

Í nevnd felagsins eru nú:

Eli Brimsvík, formaður. Danial Pauli Djurhuus, næstformaður. Koos Komminga, kassameistari. Bjarni Pétursson, nevndarlimur og Sofus Joensen, nevndarlimur.

Nevndalimir í Eftirlønargrunninum eru: Sofus Joensen, formaður, Marita í Brekkunum, næstformaður, Koos Caminga, Eli Brimsvík og Bjarni Pétursson.

Jákup Dahl er stjóri í Eftirlønargrunninum.



## Eftirlønargrunnurin

Grunnurin hevði sín 4. aðalfund 17. mars 2004. Limirnir hava í 2003 goldið tilsamans 5.058.000,- kr. inn í Eftirlønargrunnin.

Ogn grunsins er nærum øll sett í DK-statslán, býtt millum føroysku peningastovnarnar.

Í alt er keypt fyri um 19 milliónir kr., sum hevur givið eitt avkast uppá um 770.000 kr. í 2003. Tað svarar til umleið 4% p.a. í rentu. Talið kann samanberast við, at peningastovnarnir høvdu givið umleið 2% í rentu.

Arbeitt verður framvegis við at fáa fleiri feløg upp í grunnin, og vit kunnu í hesum sambandi siga, at áhugin er ítøkiligur. Í løtuni bíða vit bara eftir nøkrum útrokningum, sum aktuarur grunsins skal gera.

Gjaldið til Eftirlønargrunnin var pr. 1. oktober 2003 hækkað við 2%, so gjaldið fyri 2004 verður væl størri enn frammanundan.

Tað farna árið hava verið tríggir fundir við Tryggingareftirlitið um Eftirlønargrunnin, og siga teir seg vera væl nøgdar við umsitingina av grunninum.

*… framhald á síðu 9*




# Alt tær tørvar innan amboð og byggitilfar.

**• Kappingarførir prísir**
Timburhandilin leggur dent á altíð at bjóða viðskiftafólki sínum kappingarførar prísir.

**• Tænasta**
Vit leggja okkum eftir at bjóða viðskiftafólki okkara bestu tænastu, vegleiðing og trygd fyri røttum keypi.

**• Stórt úrval**
Vit leggja okkum altíð eftir at tú hevur eitt breitt úrval av byggitilfari í at velja.

**• Heildarloysnir**
Vit átaka okkum at geva tær tilboð uppá alt tilfar, ið skal nýtast til m.a. vanlig sethús og størri byggiarbeiði.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**

… framhald frá síðu 7

Tað er Tryggingareftirlitið, sum hevur evsta eftirlitið við Eftirlønargrunninum.

Tað eigur eisini at vera nevnt, at aktuarur grunsins, Peter Westh Nielsen, var við á aðalfundinum 17. mars, og tá var eisini møguligt hjá limunum at fáa eitt prát og seta honum spurningar í sambandi við Eftirlønargrunnin.

## Samráðingar við LÍV

Vit hava fingið tilboð frá L.Í.V. um lívstrygging, tað vil siga útgjald til eftirsitandi, tá handverkari doyr. Men eingin avgerð er enn tikin. Samtykt er, at nevndin skal arbeiða víðari við hesum máli. Tað hava vit gjørt og tað gera vit framvegis. Tað eigur eisini at verða nevnt, at ein slík trygging inniber sjálvandi at limagjaldið má hækkast til tað tíð.

## Landsfelag Handverkaranna

Eitt annað, sum vit hava arbeitt við er, at kanna um tað er møguligt at Landsfelag Handverkaranna setir á stovn ein grunn, sum skal gjalda út fyri hættisligar sjúkur, og møguliga við deyð. Hetta er fyri at spara pengar, tí kostnaðurin at tekna trygging hjá L.Í.V. kemur at liggja um 800.000 til 900.000 kr. um árið, og tað má metast at vera rættuliga nógv. Tað vísir seg kortini at vera eitt sindur trupult m.a. av skattalógini.

Vit eru eisini í gongd við at kanna um tað kann lata seg gera at fáa eina trygging hjá ALKA í Danmark. Hetta fyri at kanna, hvat tað vil kosta í mun til trygging hjá L.Í.V.

## Jólagávan

Í fjør samtykti nevndin, at vit áttu at lata limunum eina lítla jólagávu.



Tankin við hesum var eisini, at gávan skuldi heintast í nýggju felagshúsunum, og á tann hátt kundi felagið kunna limirnar meira m.a. um nýggju felagshølini, og samstundis fáa greiðu á um adressur, føðingardagar og p-tøl, vóru røtt, sum vit hava í skrásetingini. Tað eydnaðist akkurát at fáa Handverkaran út til jóla, so tað vóru ikki nógvir limir, sum náddu at støkka inn á gólvið áðrenn jól, men fleiri hava verið í ár.

Og teir limir, sum enn ikki hava heintað gávuna, kunna altíð koma inn á felagið og fáa hana útflýggjaða.

## Sjúkragrunnurin BATI

Vegna umlegging í Havnar Sjúkrakassa, ynskti Sjúkrakassin ikki at halda áfram við umsitingin av sjúkragrunninum. Og umsitingin av BATA er tí flutt til sama fólk, sum hevur umsitingina av Halgidagsgrunninum.

## Trupulleikar hjá limunum

Eisini í 2003 vendu fleiri limir sær til felagið í sambandi við ymsar trupulleikar, t.d. óreglulig lønarviðurskifti. Í flestu førum eru viðurskiftini komin í rætt lag.

Tí verri má sigast, at enn gongur okkurt sakarmál.



you can
Canon
vit hugsa í litum...
Telefax
Printarar
Skannarar
Kopimaskinur
Digital myndatól
Canon
Canon
BUSINESS•CENTER
FARODANE
Brekkutún 4
FO-100 Tórshavn
Tlf. 311414
www.farodane.fo




vit eru eina-umboð fyri
KÄRCHER
trýst spularum
til ídnað
- vit
umvæla
eisini
TÓRSHAVNAR
MASKINHANDIL
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn · Tlf. 313442




RÚNI SØRENSEN
Snikkarameistari
31 27 00 • 21 27 00
- allar umvælingar
verða gjørdar,
bæði innan- og uttandura!

Palli á Dul
góðkendur el-innleggjari
tel 310789

Eykalutir
- til flest allar bilar!
ama
Landsins størsta
goymsla av
eykalutum til bilar
Postboks 3061
Fo-110 Tórshavn,
tel 31 3816

Amboð keypir tú sjálvandi frá Balslev!
ELEKTRA BECKUM
Paslode
metabo
Tel 31 11 22
www.balslev.fo

STATOIL
P/F STATOIL FØROYAR
Viðarnes, 100 Tórshavn
Tel 34 35 00, Fax 34 35 01

… framhald frá síðu 3

ikki megna, ella skulu, laga útbúgvingina í Føroyum eftir teimum broytingum, sum fara fram í Danmark.

**Hvønn veg skulu vit fara**

Vit í Føroyum mugu tí taka støðu til hvønn veg vit skulu fara?

Eingin ivi man verða um, hvør fyrst og fremst skal taka støðu til hetta. Tó er neyðugt at vinnan samstarvar við tann partin, sum umboðar útbúgvingarnar, ið fara fram á skúlunum.

Hvussu framtíðar handverksútbúgvingin skal skipast, er ikki einfaldur spurningur at svara. Tó er neyðugt at tora at seta hol á kjakið soleiðis, at tørvurin verður nøktaður hjá tí unga, sum fer undir eina yrkisútbúgving, og at útbúgvingarnar eru soleiðis skikkaðar, at tær eru lagaðar til tørvin hjá føroysku vinnuni.

**Hvussu stór skal ferðin vera**

Ferðin skal lagast soleiðis, at útbúgvingarskipanin og vinnan ikki hanga í leysari luft, meðan „Ferrari" „accelererar" við bert bilføraranum í bilinum.

Hinvegin er heldur ikki rætt, at hestavognurin hevur so lítla ferð at útbúgvingarskipanin og vinnan sjálvi byrja at ganga við síðuna av ella frammanfyri.

**Fundur í Danmark**

Aftur til áðurnevndu lýsing í danska tíðindablaðnum. Tað kann hugsast, at hetta eisini fer at gera seg galdandi í Føroyum, ikki bert innan hárfríðkanaútbúgvingina, men eisini innan fleiri aðrar handverksútbúgvingar.

Á fundinum hjá FS hevði ein framstandandi vinnulívsmaður í Danmark fyrilestur um tær stóru broytingarnar, sum í løtuni fara fram í sambandi við, at arbeiðið verður flutt til eitt nú „Balta londini", og hvørja ávirkan hann metti,



***Nýútbúnir maskinsmiðir.*** *Aftast frá vinstru: Agnar Lassaberg, Árni Andreasen, Bjarki Magnussen, Bogi Norðfoss, Brian Joensen, Gunnleif Rasmusen, Janus Knudsen. Fremst frá vinstru: Jens Olivur Erlingsson, Jóhan Ásmund Olsen, John Arni D. Samuelsen, Mikael í Jákupstovu, Rúni Eltør. Á myndini vantar Ólavur Poulsen.*

at hetta fór at hava fyri framtíðar lærlinga- og yrkisútbúgvingarnar.

M.a. legði hann herðslu á at tey, sum fóru undir eina yrkisútbúgving, fingu undirvísing innan samfelagsviðurskifti, landalæru, mál og mentan. Arbeiðsøkið hjá nýggju handverkarunum fer at verða á økjum, sum kemur at seta nýggj krøv til m.a. hesar lærugreinir.

## Munur á donsku og føroysku vinnuni

Munur er sjálvandi á føroysku og donsku handverksvinnuni, men broytingarnar runt okkum, koma altíð at hava ávirkan á okkara vinnulív og mentan, og harvið ávirkan á hvørji krøv skulu setast til føroysku yrkisútbúgvingarnar.

## Tora vit at seta spurningar sum hesar?

- Skal lærlingaútbúgvingin vera ein skúlaútbúgving?
- Er meistaralæran framhaldandi rætti útbúgvingarformurin?
- Skulu lærlingar verða ein „bílig“ arbeiðsmegi?
- Skulu lærlingaútbúgvingarnar samskipast við S.I.T.?
- Skal útbúgvingartíðin styttast?
- Skal skúlatíðin leingjast?
- Skulu lærlingar hava møguleika at velja fak sum ítrótt, sang, filosofi o.s.fr. í útbúgvingartíðini?
- Skal lærlingaútbúgvingin taka støði í framtíðarmøguleikunum hjá tí unga?
- Eru tað vinnumøguleikarnir, sum áseta krøvini?
- Skulu nakrar av útbúgvingunum leggjast saman?

## Eitt jaligt kjak

Eitt jaligt kjak hevði óivað svarað nøkrum av hesum spurningum, og kundi soleiðis verið funnið fram til, hvussu lærlinga- og yrkisútbúgvingar eiga at skipast í Føroyum í framtíðini.



***Nýútbúnir elektrikarar.*** *Frá vinstru: Bárður Dimon, Dan L. Jensen, Edvard Jacobsen, Gilli Hansen, Henning Thomsen, Ragnar Simonsen, Virgar Poulsen.*

**Alt vanligt el-tilfar**
**Skjót og trygg tænasta**

*Heildarveitarar av:*

- **ABB** El-motorum
- **DANFOSS** El-tilfari
- **OSRAM/Philips** vørum
- **NORSELIGHT/IBAK** Ljóskastarum
- **BEHA HEDO** Kabússum
- **ÚTGERÐ TIL STÓRKØKAR**
- **SKIPSKAÐALUM**
- **FREON**



team85

***Telefonin svarar alt samdøgrið!***

Stovnað 1935

# PF LEIF MOHR

Smyrilsvegur 2 · 100 Tórshavn
Tel 311220 · Fax 314862
lm@lm.fo · www.lm.fo



Finskir ketlar
vælegnaðir til
okkara brúk

P/F Maria Poulsen
á Hálsi • Tel. 312 000

HESTPRENT • TEL. 314 555

Alt innan bátaútgerð



VOLVO PENTA



GPS-plottarar
og sjálvstrarar frá
Cetrek®

Bátatænastan
Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo
www.batataenastan.fo

























**BIRGIR KROSSTEIG**
*Múrarameistari*
*Jónas Broncksgøta 33A*
Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896

Endurnýtslan

At skilja er at skilja. **Skilir tú?**

SUÐUROYAR SPARIKASSI

STUÐLAR

Postboks 2 · FO-900 Vágur
Tlf. 37 30 64 · Fax 37 33 40
E-mail: sparsu@post.olivant.fo

Postboks 374
FO-110 Tórshavn
Tlf. 32 19 98 · Fax 32 19 97

FO-950 Porkeri
Tlf. 37 39 00 · Fax 37 39 03

**PÓLAR**

*Akkumulatorar til øll endamál*

Pf. Einars Prent · 314929


Sigmundargøta 26
Rættará - 100 Tórshavn
Tel/fax: 318347
fartel: 218347/212860

TÓRSHAVNAR
SKIPASMIÐJA

Fransbreyð
...breyð frá Frans!

Fr. Restorff



Tín banki
- á privata
so væl sum
á vinnuliga
økinum

FØROYA BANKI

… framhald frá síðu 4

## Hví taka vit lærlingar?

Jú tað eru sjálvandi nógvar góðar orsøkir til, at vit taka lærlingar. Ein er, at við støðugari tilgongd av nýggjum lærlingum, so tryggjar tú framtíðina hjá virkinum.

Vit hava altíð fyri neyðini eina støðuga tilgongd av nýggjum fólki. Ein ávís frágongd er jú altíð og sum ungur elektrikari liggja nógvir møguleikar fyri framman, bæði innan arbeiðsøki og ikki minst innan víðariútbúgving, til dømis sum maskinmeistari, sum er stak vanligt, og sum til dømis verkfrøðingur.

Soleiðis kunnu vit siga, at vit ofta eru eitt fyrsta fet á leiðini hjá einum ungum lærlingi til hansara endaliga vinnuliga starv.

## Tryggja framburð

Um so er, at eitt virki skal hava lív laga, so skal virkið hugsa frameftir, t.v.s. hvussu virkinum kann tryggjast framburð og góða framtíð.

Við at taka lærlingar og læra teir upp á virkinum, í virkisins ond, við teimum normum og virðum, sum nú virkið hevur, við teimum mørkum og krøvum sum virkið hevur, ja so hevur tú á ein hátt eginframleiðslu av handverkarum. Og hesir eru framtíðin, ja teir eru virkið, tá teir eru vorðnir sveinar.

## Framtíðin hjá fakinum

Á sama hátt eru tað hesir lærlingar, sum skulu føra arvin og tær handverksligu dygdirnar víðari til komandi ættarlið av handverkarum, og tí eru teir á sama hátt samfelagsligani sæð ein treyt fyri framtíð og framburði í okkara landi.



*Arkivið við teimum mongu el-tekningunum hjá L.M.-Electric.*

Við at taka lærlingar inn, tryggjar tú eisini framtíðina hjá fakinum. Uttan dugnaligar lærlingar, sum so eisini helst skulu læra tað nýggjasta av tí nýggja á tekniska skúla, so fáa vit skjótt stórar trupulleikar. Vit verða í vanda fyri at verða afturútsigldir, og í ringasta føri byrjar fakið at doyggja innanífrá.

Her kunnu vit til dømis hugsa um støðuna miðskeiðis í 90'árunum, tá bert heilt fáir lærlingar fingu sáttmála.

## Taka ábyrgd av samfelagnum

So nýggjur íblástur frá framtøkum innan yrki, og so sjálvandi tann íblástur ungdómurin altíð hevur við sær eru eisini orsøkir til, at lærlingar verða tiknir inn. Tað ljóðar kanska hástórt at siga, at vit eisini taka ábyrgd av samfelagnum, men tað er júst tað vit gera, tá vit skriva

sáttmála við ung fólk og læra tey at taka ábyrgd av sær sjálvum og geva teimum eina útbúgving, sum tey eiga at kunna liva av restina av lívinum.

Ein fyritøka, sum javnan setur gott fólk við, hevur altíð besta møguleikan at klára seg, til gleði fyri bæði arbeiðsplássið sjálvt og fyri samfelagið.

Tá hugsað verður um hetta, er tað sjálvandi natúrligt, at vit eins og aðrir meistarar seta krøv til lærlingarnar, og til ta bakgrund teir hava, tá vit skriva sáttmála við teir. Eins og tað er klárt, at lærlingarnir sín veg hava krøv og ynskir til læruplássið.

### Hvørji eru ynskini og krøvini

Onki er at ivast í, at krøvini til okkara lærlingar eru broytt á sama hátt, sum okkara samfelag er broytt.

Fyri góðum tjúgu árum síðani, tá je sjálvur stóð í læru, í somu fyritøku har eg eri stjóri í dag, komu flestu lærlingarnir beint úr fólkaskúlanum. Helst vóru nógvir av lærlingunum glaðir at hava fingið eitt lærupláss. Tað hevði ofta størri týdning enn sjálvt fakið. Soleiðis er tað ikki longur.

### Væl betri fyri bókliga

Tað er ein kend søk, at tey ungu í dag ganga longri í skúla enn áður. Eftir fólkaskúlan fara tey ofta á onkran miðnámsskúla, meðan tey hugsað um, hvat tey skulu brúka restina av lívinum til.

Tað vil siga, at tey ið søkja lærupláss, eisini sum handverkari, ofta munnu vera væl betri fyri bókliga nú, enn fyrr.

### Ábyrgd í tí dagliga

Tað má so vera ein fyrimunur kann man halda, og eg vil siga so bæði og. Tí saman við betri bókligum førleika, er ein tendensur til at fleiri mangla arbeiðsroyndir. Og her meini eg ikki bert við lønt arbeiði, men eisini við tað at hava haft ábyrgd í tí dagliga, og at vera vanur við at hava gjørt sítt áðrenn man krevur sítt.

Um eg skal provokera eitt sindur, so vil eg siga, at hetta nokk er mest galdandi fyri tey, ið koma av teimum størru plássunum, sum til dømis úr Havnini.



*Á verkstaðnum, har hvítvørur og el-lutir verða umvald.*

### Praktiskar royndir

Hetta at hava tikið hond í við eplaveltuni, og at hava verið við til at ansað eftir seyðinum skal avgjørt ikki undirmetast.

– Her kann man so siga, at tey úr Havn ikki hava nakran størri møguliga.

… framhald á síðu 24

Henning Sørensen

MÁLARAMEISTARI

TEL. 31 47 87 & 21 89 31

**rør**-tænastan

Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

Eyðfinn Hansen
Box 1106
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
tlf./fax: +298 31 91 22
fartlf.: +298 21 91 22
e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo




LÍV

Føroya Lívstrygging · P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 318919

www.reproz.com




**flogfelag Føroya fólks**

Beinleiðis úr Føroyum til Keypmannahavnar, Billund,
Reykjavíkar, Stavanger, Oslo, Aberdeen og London.

ATLANTIC AIRWAYS

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

*… framhald frá síðu 21*

Tí her er hugburðurin tann, at um tað er pláss fyri eini eplaveltu, so er pláss fyri einum húsum, og um tað er pláss fyri tveimum eplaveltum, so er pláss fyri einum bygningi í fimm hæddum.

**Hvat liggur í eini lærlingaútbúgving?**

Men fyri at venda aftur til evnið. Hvat liggur í eini lærlingaútbúgving ? Jú har liggja bæði tann bókligi parturin av útbúgvingini, sum fyrigongur fyri okkara part á Tekniska skúla í Havn, men so sanniliga eisini tann verkligi parturin, sum tað ikki verður tosað nógv um í tí dagliga.

Tann parturin av læruni vit hava ábyrgdina av, er at læra teir handverkið sjálvandi, men eisini hetta at møta vælupplagdur til arbeiðis hvønn morgun, íroknað mánamorgun. At læra teir at vera millum onnur fólk, og at læra teir, at teir kunnu fara nøgdir heim til hús eftir arbeiðslok, tá teir hava gjørt eitt dagsverk.

**Ein størri uppgáva nú**

Hetta er eftir okkara fatan ein størri uppgáva nú, enn fyri árum síðani, og ein uppgáva, sum avgjørt ikki má undirmetast.

Hetta hevur so eisini ávirkað okkara krøv og ynski, tá vit taka lærlingar.

Teir eru generelt sæð eldri nú, enn fyrr, tá teir byrja, og at hava arbeiðsroyndir er ein stórur fyrimunur. Ein væl størri fyrimunur enn at hava tikið eitt studentsprógv ella aðra miðnámsútbúgving.

Eg vil so siga, at vit als ongar trupulleikar hava við at finna lærlingar til okkara læerupláss, sum vit eru nøgdir við. Teir vera bara valdir á ein eitt sindur annan hátt enn fyrr.



*Pauli Hofgaard, stjóri, L.M.-Electric.*

**Til reiðar at lyfta byrðar**

Tá lærlingurin er liðugur við sína lærutíð, eiga vit at hava lært hann virðing fyri sínum arbeiðsplássi, fyri sínum faki, fyri kundanum og harvið fyri sínum arbeiði. Tástani hava vit sum lærupláss eisini nøkta okkara uppgávu, og hava ein útlærdan svein, sum er til reiðar at lyfta sínar byrðar í samfelagnum, og sjálvandi at virka fyri okkum sum fyritøka.

**Krøvini hjá lærlingunum**

Nú havi eg bert tosað um okkara krøv mótvegis lærlinginum. Men tað er klárt, at krøvini frá nógvum lærlingum til sítt arbeiðspláss, eisini í nógvum førum eru onnur nú, enn fyrr.

*… framhald á síðu 26*

# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarir:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

Audi

SEAT

PORSCHE

**Bilasølan**
við Øssur Johannesen
Vegurin Langi - 188 Hoyvík - tlf. 31 53 54 - www.audi-vw.net

… framhald frá síðu 24

Teir flestu hava eina ætlan við júst hesum læruplássinum.

Arbeiðsplássið skal helst vera fjølbroytt, og ynskir eru altíð um at fáa ymiskar uppgávur. Eisini eru nógvir, sum longu hava longri útbúgving fyri eyga, tá teir fara í læru.

**Ein skipan sum roynist væl**

Skipanin, sum vit hava í Føroyum, við tekniska skúla, lærupláss og lærlingi er ein skipan sum roynist væl. Hetta er ein skipan, sum gevur eina breiða fakliga og verkligari vitan á sínum øki. Hetta ger at okkara handverkarar eisini eru eftirspurdir uttanfyri landoddarnar, og tað borgar fyri góðsku.

**Halda fast um meistaralæruna**

Við hesum í huga vil eg vísa á, hvussu ómetaliga neyðugt tað er hjá okkum, at halda fast um meistaralæruna. Ikki tí at 1/2 ella 1 ár til SIT er nakað niðurbrótandi.

Nei, men tosið og tankarnir, sum eru frammi viðhvørt um at kopiera danir, og at útbúgva handverkarar mest sum á skúlabonki, – er eftir mínari meting ein vána loysn.

**Trupulleikar í Danmark**

Mær vitandi eru vantandi praktikkpláss og vantandi arbeiðstakarar ein stórur trupulleiki við hesi skipan í Danmark. Tá danir, sum eru so óendaliga nógv fleiri í mun til okkum, hava trupulleikar, hvussu ætlar nakar so, at henda skipan kann tilføra okkara lítla landi nakað positivt á hesum øki.

Ein slík skipan tekur ikki støði í tørvi á arbeiðsmarknaðinum, sum skipanin við meistaralæru ger, og kunnu vit tí risikera at útboðið av „skúlahandverkarum" í einstøkum lærugreinum verður





størri enn tørvurin á arbeiðsmarknaðinum er.

## Geva ungum fólki eitt reyðfiskaprógv

Okkum vantar ikki serfrøðingar, sum eru upplærdir á skúlabonki til at føra handverkið víðari til okkara eftirkomarar. Vit skulu hava handverkarar, sum eru upplærdir á arbeiðsplássinum av teimum, sum eisini eru upplærdir á arbeiðsplássinum. Vit skulu hava handverkarar við fakligari og verkligari breiðari vitan, sum kunnu nøkta einhvønn tørv á tí privata- og almenna marknaðinum.

Eg má fyri okkara part siga, at um vit enda við somu støðu sum í Danmark, har nógvir lærlingar tíverri noyðast at avgreiða sína praktikktíð á skúlanum, so eru vit í vanda fyri at geva ungum fólki eitt reyðfiskaprógv, um tey kunnu kalla seg sveinar uttan at hava verið á einum arbeiðsplássi. Hetta er í hvussu so er nakað, vit høvdu hugsað nógv um, áðrenn vit høvdu sett ein tílíkan svein í starv.

Sum tað vónandi skilst, so haldi eg, at vit skulu varðveita meistaralæruna!

## Tekniski skúlin í Havn

Nú høvið býðst fari eg at heita á landsstýrismannin í mentamálum um at bera so í bandi, at Tekniski skúlin í Havn, sum hevur verið ein fyribilsloysn í 25-30 ár fær munandi betri kor at arbeiða undir enn í dag. Tað man vera við at vera seinasta útkall. Og eg meini, at vit sum arbeiðsgevarar hava ávís krøv galdandi hesum viðvíkjandi. Tann vinnuligi parturin av samfelagnum roynir í hesum førinum at taka sær av at útbúgva ung fólk til at føra samfelagið víðari, og nú má tann almenni parturin av hesum eisini koma við. Annars hongur tað ikki saman.

## Somu virðing fyri verkligum og bókligum

Ein skal minnast til, at bert við at hava somu virðing fyri verkligum og bókligum útbúgvingum koma vit víðari. Tað er líka nógv brúk fyri báðum.

Til endans fari eg at heita á allar bólkar, sum eru savnaðir her í dag, og vara av lærlingaútbúgvingini, um at standa saman, soleiðis at vit framhaldandi kunnu menna handverkaravinnuna til gagns fyri Føroya land.

SANSIR TEL 355 355




# Øll kunnu keypa virðisbrøv

Mangir løkir smáir gera stórar áir, siga vit. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum. Ganga fleiri saman um at gera íløgur, kunnu tey fáa teir fyrimunir, sum størri íleggjarar fáa. Íløguprógv kunnu keypast fyri smærri upphæddir – heilt niður í 1.000 krónur. Kaupthing hevur fleiri íløgufeløg at velja ímillum – t.d. feløgini »Norrøn partabrøv« og »Lánsbrøv í donskum krónum«.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

* Handverksútbúgvingar

* Støðisútbúgving

* Yrkisakademiútbúgvingar

* Skúlaheim

www.tst.fo - tst@tst.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



Marknagilsvegur 75
Postboks 239
110 Tórshavn

telefon 311957 - telefax 316621

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

Dygdar tilfar

FO-350 Vestmanna · Tlf. 472 000 · Fax 472 001 · www.vt.fo

Pf. Einars Prent · tel. 31 49 29

… framhald frá síðu 5

## Væl nøgdur við undirvísingina

Í sambandi við læruna til húsasmið hevur Bárður verið 6 skúlaskeið á Tekniska Skúla í Havn. Tey síðstu 5 skúlaskeiðini hava verið 5 vikur hvørt, og Bárður sigur, at tey hava øll verið góð og lærurík. Hann hevur verið sera væl nøgdur við undirvísingina, men heldur at eitt av skúlaskeiðunum kundi verið lagt øðrvísi til rættis.

## Útbúgvingartíðin

Bárður heldur, at tann samlaða útbúgvingartíðin er passalig sum er.

Men skúlaskeiðini kundu verið øðrvísi, t.d. at fyrsta skeiðið kundi verið 10 vikur og ikki 20 vikur sum tað er nú.

Fyrsta skúlaskeiðið er ov drúgt, tað er næstan eitt hálvt ár, og tað er ov leingi út í eitt. Teir flestu lærlingarnir vilja sleppa at royna seg í handverkinum skjótari. Tað átti at borið til at skipað tað soleiðis, at sama pensum var býtt minst í tvey, soleiðis at man kom ígjøgnum sama innihald í styttri skúlaskeiðum.

## At vera lærlingur

Bárður leggur dent á, at tað er umráðandi at lærlingar í lærutíðini sleppa at gera mest møguligt av handverksarbeiði saman við útlærdum sveinum, og eisini sleppa at royna seg meira sjálvstøðugt. Tað má ansast eftir at lærlingar ikki í ov stóran mun verða settir t.d. at rudda, feiga, og annað, sum sveinarnir ikki tíma at gera. Til stuttleikar kunnu vit eisini siga, at lærlingurin eigur at sleppa undan at ganga ørindi t.d. fyri konuna hjá meistaranum. Tað havi eg nú kortini ongantíð roynt, leggur Bárður skemtandi afturat.

## Gylti hamarin

Bárður sigur, at tað kom óvart á hann, tá hann á almennari samkomu á Skúlaheiminum fekk at vita, at hann var kosin at fáa „Gylta hamaran". Hann sigur, at teir á einum av skúlaskeiðunum høvdu frætt um, at skúlin fór at læta einum av lærlingunum Gylta hamaran. Annars visti hann ikki nógv um henda góða hamara. Men teir høvdu kortini onkuntíð í skemti, arga hvønn annan við hesum góða hamara. Tá okkurt gekk minni gott í skúlanum plagdu teir at siga, at nú reyk hamarin hjá tær. Og í øðrum føri høvdu teir kanska sagt, at hatta er so mikið gott, at tú fert at fáa Gylta hamaran.

## Sveinar mugu dagføra sína vitan

Hóast man hevur fingið sveinabræv, so er man kortini ikki liðugur at læra, sigur Bárður. Tað hevur stóran týdning at handverkarar dagføra sína vitan, og royna nýggjar møguleikar innan fakið. Hjá húsasmiðum hugsið eg t.d. um nýggj amboð, nýggj besløg, og ymiskt, sum kann lætta um arbeiði, og tá eisini fáa tað at ganga skjótari.

## Man skal eisini duga við fólki

Tað er annars eisini umráðandi, at ein altíð dugir at finna rættar og góðar loysnir, sum ikki gera arbeiði óneyðuga dýrt. Og tað ræður um at duga at vera skjótur, men handverkið eigur kortini altíð at vera snøgt og væl frágingið. Tá man er handverkari hevur tað eisini stóran týdning, at man er fyrikomandi, og dugir væl við fólki.

**Kreppan var ikki bara negativ**

Eg havi eisini hug at nevna, at kreppan í nítiárunum ikki bara var negativ. Tá fóru nógvir sveinar í onnur lond at arbeiða, og komu har mangan at gera arbeiði, sum teir ikki høvdu roynt áður. Á tann hátt fingu teir eisini lærdóm og førleika, sum teir ikki høvdu frammanundan. Eg meti at hetta hevði so mikið stóra ávirkan, at tað lyfti føroyskt handverk upp á eitt hægri støði enn tað var frammanundan. Á tann hátt kunnu vit siga at kreppan hevði positiv árin á føroysk handverk.

**Framtíðin**

Fyri 4 mánaðum síðani fingu Bárður og konan Vivie tvillingar. Frammanundan høvdu tey eina 2 ára gamla dóttir.

Vivie hevur lisið lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya í 3 ár.

Í 2003 helt hon fram við lestrinum á „Den Kongelige Veterinære- og Landbohøjskole" í Keypmannahavn, og skal komandi árið skriva serritgerð.

So nú Bárður er liðugur við læruna er ætlanin at flyta til Keypmannahavnar at búgva saman við konu og børnum hetta komandi árið.

**Gylti hamarin**

Tað er altjóða fyritøkan ISOVER, sum letur gylta hamaran. Um endamálið sigur fyritøkan:

**ISOVER-prisen**

Formålet med ISOVER-prisen er, at belønne en ekstraordinær god indsats under hele uddannelseforløbet som lærling.

Det er altså en samlet bedømmelse af bl.a. flid, samarbejdsevner og det håndværksmæssige niveau, der ligger til grund for bedømmelsen.



***Nýútbúnir húsasmiðir.*** *Aftast frá vinstru: Adrian Joensen, Elith Godtfred, Hergeir Carlsson, Óla Svein Hansen, Ottar av Lofti, Rógvi Jacobsen. Fremst frá vinstru: Bárður Davidsen, Borgar Danielsen, Dánial Jakob Olsen, Edward av Kák. Á myndini vantar Óla Hendrik av Fløtum.*



# Hevur tú tað, sum er líka umráðandi sum hetta..?

Skalt tú út í heim at ferðast, er tað av alstórum týdningi, at tú hevur røttu ferðatryggingina. Hetta kunnu vit bjóða tær.

Tú kanst fáa ferðatryggingina sum ískoyti til familjutryggingina, so tú sleppur undan at hugsa um ferðatrygging, hvørja ferð tú ella húskið skulu út at ferðast. Tú kanst eisini fáa eina vanliga ferðatrygging til ta einkultu ferðina.

Vit bjóða fylgjandi tryggingar:

- Ferðatrygging sum ískoyti til familjutrygging
- Vanliga ferðatrygging
- Vinnuferðatrygging
- Langtíðarferðatrygging
- Avboðstrygging

Fá eina ferðatrygging frá Trygd á tíni ferðaskrivstovu, hjá Trygd ella í eini av deildunum hjá Føroya Banka.



*Ikki bara tryggingar, men eisini trygd*

**TRYGD**

Gongin 7 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 35 81 00 Fax 31 72 11
e-mail: trygd@trygd.fo www.trygd.fo

petur & petur • 320870